VARPIÐ
Skráir og ummælir
16 síður
Hvønn fríggjadag

SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá TV • Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ DK 4 • TV 1000 • TV3 dk • Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel Euro Sport • MTV • National Geographic • TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

STARVSLÝSING

Hjálparfólk

Søkt verður eftir hjálparfólki til starvsfólkadeildina at byrja beinanvegin. Starvsfólkadeildin varðar av starvsfólkamálum, skrivstovufyrisiting og aðrari umsiting.

Arbeiðsuppgávur
Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um innan- og uttanhýsis ørindi, avloysing í móttøkuni við telefon, posti og annað fyrifallandi arbeiði á skrivstovuni. Arbeiðstíðin er vanliga frá kl. 08.00-16.00.

Førleikakrøv
Søkt verður eftir ungum fólki við students-, HF- ella HH-prógvi, og sum ætlar sær at fara undir víðari útbúgving um eitt ár ella so.

Setanartreytir
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Umsóknir
Umsóknir verða at senda

Landsverki
Postsmoga 78
FO-110 Tórshavn

og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 7. juli 2004. Merkið brævbjálvan ”Umsókn eftir hjálparfólki”. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast á tlf. 311 333 frá Levi Hentze, starvsfólkaleiðara.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverkv.fo

LANDSVERK byggir land

KPMG

KPMG søkir kt-fólk, grannskoðara og skrivstovunæming

KT-grannskoðari
Arbeiðið fevnir um kt-grannskoðan og veitan av ráðgeving á kt-økinum til kundar okkara.
Neyðugt er við royndum og ástøðiligari útbúgving innan kt-økið og/ella roknskaparøkið, helst bæði.
Neyðugt er eisini við áhuga fyri víðari lesnaði.

Grannskoðari
Arbeiðið fevnir um grannskoðan, roknskaparhjálp og eina røð av øðrum tænastum til føroyskar og útlendskar privatar fyritøkur innan flest allar vinnugreinar, eins og til kommunur og almennar stovnar.
Neyðugt er við royndum innan bókhalds- og roknskaparøkið og at hava staðið í minsta lagi HH prógv.

Skrivstovunæmingur
Arbeiðið og útbúgvingin fer fram eftir galdandi reglum.

Umsøkjararnir
Tað er eitt krav, at umsøkjararnir, umframt oman fyri nevndu royndir og útbúgving, eru fryntligir og fyrikomandi og hava lætt við at samstarva við onnur.
Kt-grannskoðarin og grannskoðarin skulu vera til reiðar at arbeiða uttan fyri vanliga arbeiðstíð, um tørvur er á tí. Lønin verður ásett eftir útbúgving og royndum.

Umsóknirnar
Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir verður at senda okkum skjótast gjørligt ella í seinasta lagi 15. juli 2004.
Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Árna Ellefsen, statsaut. revisor.

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
kpmg@kpmg.fo • www.kpmg.fo

Tórshavn
Staravegur 17 · Postboks 3258
Telefon 34 34 34 · Telefax 34 34 35

Saltangará
Heiðavegur 15 · Postboks 190
Telefon 34 34 54 · Telefax 474 475

www.sansir.fo · ©KPMG, føroyska limafelagið í altjóða KPMG, ið er sveisiskur felagsskapur. Endurprenting bannað.

Føroya Tele
heldur ídnaðarfrí
19. juli - 9. august




Góðu viðskiftafólk

Í summar flytir Føroya Tele í nýtt høvuðssæti í Klingruni. Í hesum sambandi halda vit ídnaðarfrífrá mánadegnum 19. juli til og við fríggjadagin 6. august – vika 30, 31 og 32.
Í hesum tíðarskeiði er virksemið á Føroya Tele munandi skert.
Er tørvur á ávísari tænastu ella ávísum arbeiði hetta tíðarskeið, er best at boða Føroya Tele frá sum skjótast.
Telebúðirnar hava opið sum vant.
Føroya Tele ynskir øllum eina góða summarfrítíð.

FØROYATELE
www.tele.fo · tel 30 30 30



# Opið ølstríð

**– Vit hava fleiri ferðir gjørt vart við, at vit fegnir vilja selja øl í Føroyahúsinum í Keypmannahavn, men við tað at alment lønti leiðarin har, Martin Fjallstein, er privatur umboðsmaður hjá Føroya Bjóri í Danmark, sleppa vit ikki inn, sigur annar eigarin á Restorff´s Bryggjaríi, Johan Mortensen**

ØLSØLA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Annar eigarin á Restorff´s Bryggjaríi, Johan Mortensen, er ikki fegin um viðferðina, fyritøka hansara hevur fingið frá leiðaranum í alment rikna Føroyahúsinum í Keypmannahavn, sum er ein miðdepil fyri føroyskar útisetar í Danmark.



*- Føroyahúsið er alment rikið og er á fíggjarlógini. Sjálvandi eru nakrar av inntøkukeldunum tiltøk í húsinum, men tá ein meiri ella minni alment løntur stjóri nýtir sessin til privat áhugamál, er okkurt heilt galið, sigur Johan Mortensen*

## Inhabilitetur

Martin Fjallstein er alment løntur leiðari í Føroyahúsin-um, og sambært Johan Mortensen er hann eisini privatur umboðsmaður hjá Føroya Bjóri. Tað vil sambært honum siga, at hann hevur fingið loyvi at vera innflytari hjá Føroya Bjóri, og at hann selur teirra øl fyri egna rokning og egnan vinning í Danmark.

Johan Mortensen sigur, at teir meiri enn einaferð hava gjørt vart við og spurt seg fyri, hví Restorff´s øl ikki verður selt í Føroyahúsinum í Keypmannahavn, men bert øl frá Føroya Bjóri.

– Higartil hevur Martin Fjallstein sagt, at teir hava gjørt eina roynd at selja okkara øl, men at tað ikki hevur eydnast serliga væl, tí áhugin hevur verið so lítil millum gestirnar. Men hetta er ikki satt. Veruliga orsøkin er, at Johan Fjallstein er privatur umboðsmaður hjá Føroya Bjóri í Danmark, sigur ein heldur bersøgin Johan Mortensen.

Hann heldur, at Martin Fjallstein verjir og hevur givið Føroya Bjóri eksklusivitet í almenna Føroyahúsinum, og at talan er um órættvíst business. Hetta heldur Johan ikki vera rætt.

– Føroyahúsið er alment rikið og er á fíggjarlógini. Sjálvandi eru nakrar av inntøkukeldunum tiltøk í húsinum, men tá ein meiri ella minni alment løntur stjóri nýtir sessin til privat áhugamál, er okkurt heilt galið, sigur Johan Mortensen.

Leiðslan í Restorff´s Bryggjaríi er sera hørm um viðferðina, teir higartil hava fingið í Føroyahúsinum, og Johan heldur, at talan er um órættvísi, tá annað bryggjaríið hevur fingið durafjórðingin í Føroyahúsinum.

## Áhugi fyri Restorff

Johan Mortensen sigur, at Martin Fjallstein hevur grundgivið hesum við, at áhugin hevur verið so lítil, tá Restorff´s øl hevur verið selt í Føroyahúsinum, og tað er orsøkin til, at bert Føroya Bjór í dag verður selt.

– Men hetta er ikki rætt. Vit sendu einaferð nakrar kassar niður í sambandi við onkra test, men ein verulig roynd er ongantíð gjørd at selja okkara øl. Høvdu vit fingið høvið at selja í Føroyahúsinum, hevði sølan heilt víst verið góð, ivast Johan Mortensen ikki í.

– Fleiri hava spurt okkum, hví okkara øl ikki verður selt í húsinum fyri útisetar, og áhugin er avgjørt til staðar, slær Johan fast. Hann sigur, at serliga millum útisetar er Vargurin og Mungát væl umtókt.

## Bryggjan selur bæði

Johan Mortensen vísir á, at tá Bryggjan í Keypmannahavn fyri stuttum læt upp, býtti leiðarin Trygvi Johansen søluna so kristiliga millum bæði bryggjaríini í Føroyum.

– Hetta er korrekti hátturin at reka alment virksemi til frama fyri heildina. Tí eru vit sera harmir um, at privat og peningalig áhugamál hjá einum persóni skulu forða okkum at selja útisetum okkara í Danmark øl, sigur Johan Mortensen. Spurdur, um fíggjarligi missurin er stórur orsakað av ongari sølu í Føroyahúsinum, er Johan greiður.

– Eingin søla er ov lítil, og vit eru glaðir fyri alt, vit fáa høvi at selja. Men tað er eins nógv ein prestiga at sleppa at selja í miðdeplinum fyri øllum útisetavirksemi í Danmark. Johan Mortensen kallar hetta einki minni enn alment svans, og vil hann undirstrika tað óreglusemi, sum fer fram á føroyska ølmarknaðinum.

**– Vit satsa uppá tað, sum kann seljast, og higartil hevur Føroya Bjór verið best umtókta ølið í Føroyahúsinum, meðan vit ikki eru slopnir av við Restorff´s øl, tá høvið hevur verið. Hetta er einfalda orsøkin til, at vit ikki selja Restorff´s øl, sigur leiðarin í Føroyahúsinum, Martin Fjallsbak**

ØLSØLA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Tá Martin Fjallstein tók við leiðarasessinum í Føroyahúsinum í Keypmannahavn, hevði Føroyahúsið leingi keypt Føroya Bjór frá eini kvinnu á Vesterbro, sum innflutti nógv útlendskt øl, m.a. úr Klaksvík. Tá kvinnan doyði, fór Martin sjálvur at innflyta Føroya Bjór í kassum, eins og hann innflutti føroyskar frystimatvørur frá Poul Hansen heilsølu til Føroyahúsið at selja.



*– Mín uppgáva er at reka Føroyahúsið á bestan hátt, og mín uppgáva er ikki at marknaðarføra Restorff. Teir mugu sjálvir sannføra keyparar um, at teirra øl selur, sigur Martin Fjallstein, leiðari í Føroyahúsinum í Keypmannahavn*

## Restorff stóð eftir

Í 2002 skipaði Martin Fjallstein fyri ølsmakking í Føroyahúsinum, har bæði Føroya Bjór og Restorff´s Bryggjarí vóru umboðað. Hetta var ein roynd at vita, hvat øl var betri umtókt, og úrslitið var sambært Martin greitt.

– Eftir tiltakið høvdu vit fleiri kassar av bæði Føroya Bjór og Restorff, og tað vísti seg, at vit sluppu ikki av við ølið hjá Restorff. Eingin áhugi varð fyri hesum millum gestirnar. Einfalda orsøkin til, at vit ikki selja Restorff, er sostatt hon, at vøran ikki verður seld, sigur Martin Fjallstein.

## Fær ongan vinning

Leiðarin í Føroyahúsinum ásannar, at hann í 2000 byrjaði at umboða Føroya Bjór á ølfestivalum í Danmark, eins og hann byrjaði at selja Føroya Bjór til aðrar keyparar í Danmark. Men hann leggur dent á, at hann ongan vinning fær fyri søluna av Føroya Bjóri.

– Mín uppgáva er at fáa tað fíggjarliga at mala runt í Føroyahúsinum, og tí selji eg ta vøruna, sum kastar mest av sær. Eg fái eina fasta almenna løn sum leiðari, og sølan av Føroya Bjór ávirkar tí ikki meg persónliga, greiðir Martin Fjallstein frá. Hann sigur, at yvirskotið fer til raksturin av húsinum.

Føroyahúsið fær eina játtan á 1,5 milliónir á fíggjarlógini, meðan inntøkan gjøgum sølu av mat- og drykkuvørum, tiltøkum og útleigan av húsinum er á umleið 1,2 milliónir.

## Restorff kærir

Eftir at Martin Fjallstein fór at umboða Føroya Bjór á ølfestivali í Danmark í 2000, sendi Restorff´s Bryggjarí eina kæru til mentamálaráðið, men henda kæran er sambært Martini Fjallstein ignorerað. Sjálvur svaraði leiðarin á Føroyahúsinum kæruni við at vísa á, at hann ikki slapp av við ølið hjá Restorff, tá høvið var til hetta. Samstundis metir hann tað ikki vera hansara uppgáva at marknaðarføra øl, sum tykist vera striltið at sleppa av við.

– Nevndin fyri Føroyahúsið veit eisini, at eg eri umboðsmaður hjá Føroya Bjóri á festivalunum, men hetta ávirkar einki, tí eg fái ongan vinning av søluni, sigur Martin. Hann sigur tað vera betri og praktiskari á allan hátt at hava ein leverandør til mat (Poul Hansen) og ein leverandør til øl (Føroya Bjór).

– Eg mælti eftir kæruna Restorff´s Bryggjaríi til at vísa andlit og luttaka á ølfestivalunum í Danmark, sum gevur sera góða reklamu, men higartil hava teir ikki víst hesum áhuga. Tað hevði annars verið ein góður møguleiki hjá teimum at vísa dygdina á teirra øli, sigur Martin Fjallstein, sum skemtandi leggur afturat, at Mungát er ein dygdargóð øl.

## Sama støðan á Jacques

Martin Fjallstein sigur, at tað er hansara einfalda uppgávu at fáa økonomiskan umsetning, og hann heldur, at tað má vera ein orsøk til, at vælumtókti náttklubbin millum føroyingar, Jacques, heldur ikki selur Restorff, og at nýggja vertshúsið eftir fyrrverandi Skarv eisini hevur ein einstakan leverandør, nevniliga Føroya Bjór.

– Føroya Bjór er vælumtókt í stórum pørtum av Danmark, og úrslitini á ølfestivalunum hava givið Føroya Bjór gott umdømi. Higartil hevur Føroya Bjór eisini staðið fyri bestu søluni hjá okkum, og tí selja vit teirra øl.

Spurdur, um hann sum almennur leiðari á sjálvsognarstovninum Føroyahúsið hevur givið Restorff ein fair møguleika, er Matin Fjallstein greiður.

– Mín uppgáva er at reka Føroyahúsið á bestan hátt, og mín uppgáva er ikki at marknaðarføra Restorff. Teir mugu sjálvir sannføra keyparar um, at teirra øl selur, sigur Martin Fjallstein at enda.